# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 06.02.2017 kl. 17.30

Á fundi: Janus Thomsen
Trúgvi Gudmundarson
Niels Jacob Thomsen
Magni Bertholdsen
Niels Olaf Eyvindsson
Eir J. Norðberg
Gunnhild Mortensen

Ikki møtt:

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

Formaðurin bað um loyvi at taka umsóknina frá Hvalbiar sóknar bygda- og kolasavn fyrst (partur av mál nr. 7) - hetta varð játtað.

7. **Umsókn um stuðul til Hvalbiar sóknar bygda- og kolasavn.**
   Søkt verður um kr. 100.000 í stuðli í ár.
   Trivnaðarnevnd: Nevndin er samd um, at henda upphædd er ov stór at stuðla við í einum.
   Fíggjarnevnd: Nevndin hevur viðgjørt málið og mælir til at stuðla við kr. 60.000, treytað av, at tey yvirtaka krambúðina á Hólum í verandi standi. Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum frá Fíggjarnevndini.

1. **Umsókn um lýsingarpening til borðspælið Herferð.**
   Samtykt varð einmælt ikki at luttaka í verkætlanini.

2. **Umsókn um fíggjarligan stuðul frá Parkinsonfelagnum.**
   Samtykt varð einmælt at stuðla við kr. 3.000.

3. **Umsókn um loyvi at brúka Sandvíkar skúla í vetrarhálvuni.**
   Ætlanin er at savna fólkið í Sandvík eitt kvøld um vikuna í skúlanum í vetrarhálvuni. Samtykt varð einmælt at játta hesum.

4. **Val av tveimum varaumboðum í skúlastýrið í Hvalba.**
   - Skúlastýrið í Hvalba:
     Føst umboð: Janus Thomsen – Eir J. Norðberg.
     Varaumboð: Gunnhild Mortensen – Niels Olaf Eyvindsson, einmælt samtykt.

5. **Góðkenning av roknskapi fyri 2016 hjá Hvalbiar skúlabókasavni.**
   Roknskapurin fyri 2016 hjá bókasavninum varð einmælt samtyktur.

6. **Kommunustýrisskipan og fundarskipan fyri Hvalbiar Kommunu.**
   Samtykt varð einmælt at seta ein bólk, mannaðan við Janus Thomsen, Trúgva Gudmundarson, Niels Olaf Eyvindsson og Niels Jacob Thomsen at eftirhyggja kommunustýrisskipanina fyri Hvalbiar Kommunu.

7. **Kunning um hvørji mál eru beind í nevnd síðani síðsta fund.**

   **Tekniska nevnd:**
   - Skriv frá borgara viðv. gøtuljósi.
   - Skriv frá Umhvørvisstovuni um frágreiðing í sambandi við spillivatnsviðurskifti.
   - Tilboð frá Sp/f Munin uppá kortskipan og skipan til rottutýning.
   - Skriv frá Hans Haraldsen um vatninnføring til dagstovnin.

   **Vega- og havnanevnd:**
   - Skriv viðvíkjandi neysti v.m.

   **Trivnaðarnevnd:**
   - Umsókn um stuðul til Hvalbiar sóknar bygda- og kolasavn.

   **Fíggjarnevnd:**
   - Umsókn um fíggjarligan stuðul 2017 frá Hvalbiar sóknar bygda- og kolasavni.
   - Tilboð frá Sp/f Munin uppá kortskipan og skipan til rottutýning.

8. **Kunning um málsviðgerð síðani síðsta fund.**
   **Tekniska nevnd (framløga Niels Olaf Eyvindsson):**
   - Gøtuljós inn til Krókin: Samtykt varð einmælt, at nevndin kannar málið nærri, áðrenn støða verður tikin.
   - Tilboð uppá kortskipan og skipan rottutýning: Nevndin ynskir at kanna aðrar møguleikar og útseta málið.

- Vatninnføring til dagstovnin: Nevndin mælir til, at vatnleiðing verður grivin frá skúlanum oman til dagstovnin. Verandi UV-tól í skúlanum klárar at nøkta tørvin hjá bæði skúlanum og dagstovninum. Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum.
- Spillivatnsskipan: Í Hvalba eru 8 hús, sum ikki eru íbundin kloakkina. Í Sandvík hinvegin er stórur partur av bygdini ikki rørlagdur enn. Nevndin mælir til at fáa gjørt liðugt í Hvalba og síðani fara undir arbeiðið í Sandvík. Hvussu spillivatnið verður ført út á streymasjógv, verður kannað nærri.

**Trivnaðarnevnd (framløga Eir J. Norðberg)**

- Roynhøllin – nýtt tak: Nevndin hevur havt fund við Hans Haraldsen í sambandi við nýtt tak á Roynhøllina. Eftir tilmæli frá nevndini, varð einmælt samtykt, at Hans Haraldsen ger útbjóðingartilfar v.m.

  Nevndin hevur gjørt tilmæli í sambandi við leigu av Roynhøllini:

  | | |
  |---|---|
  | Brúdleyp, rundir dagar v.m. upp til 3 dagar | **kr. 3.000** |
  | Leiga av høllini ein dag – dagin áðrenn at gera klárt | **kr. 1.500** |
  | Leiga av høllini ein dag – t.d. bingo | **kr. 1.000** |
  | Vælgerandi endamál ein dag | **kr. 500** |

  Leigarin ruddar upp og vaskar WC og køk. Húsavørður vaskar gólv. Um ynskist, so kostar vasking kr. 500 eyka. Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum.
- Jørð- og lendisarbeiði dagstovn: Nevndin mælir til, at Tummas Niclasen fær loyvi at byrja tilgongdina í sambandi við jørð- og lendisarbeiðið runt um dagstovnin sum skjótast. Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum.

  (Trúgvi Gudmundarson og Eir J. Norðberg luttóku ikki í viðgerðini av næsta máli).

  Í sambandi við at seta stórar steinar upp (grovlaðing) framvið, varð einmælt samtykt, at Trúgvi Gudmundarson ger hetta arbeiði. Samtykt varð við trimum atkvøðum fyri at játta hesum.

**Fíggjarnevnd (framløga Janus Thomsen)**

- Tilboð uppá kortskipan og skipan til rottutýning: Nevndin hevur viðgjørt tilboðini frá Sp/f Munin og mælir bygdarráðnum **ikki** at taka av tilboðunum. Einmælt samtykt.

**10. Ikki almenn mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 23.00

Janus Thomsen Trúgvi Gudmundarson Magni Bertholdsen Niels J. Thomsen

Niels Olaf Eyvindsson Gunnhild Mortensen Eir J. Norðberg